














# Costa Blanca á vári og heysti

Í sólorkuøkinum hava vit ítróttafasilitetir í heimsflokki við nútímans vøllum, hallum og hentleikum annars. Vit hava nógvar fótbóltsvøllir við ávikavist grasi og graslíki. Vit hava góð øki til tennis, padel, padbol og aðrar ítróttir umframt hallir til alla innanduraítrótt.

Vit eru harafturat í einum teimum vakrastu og best umtóktu súkklulendunum í øllum Europa. Strendur, flatlendi, landbúnaðarøki, heyggjar og fjøll draga at sær fremstu súkklarar í heiminum. Bæði Tour-de-France- og Vuelta-a-España-súkklarar venja her.

Umframt tað hava vit okkara egna vatnland og hópin av øðrum hentleikum á Albir Garden-resortinum.

Og so eru møguleikarnir fyri vøkrum og spennandi útferðum – bæði á bygd og í býi – nærum ótaldir.

Partar av árinum hava vit beinleiðis flúgving við okkara egnu leiguflogførum millum Vágar og Alicante.





# Gran Canaria á vetri

Kanariska oyggin hevur eitt sera javnt vetrarveður við lýggjum veðri, sum ger hana til eitt vælegnað stað at vitja tann partin av árinum, tá europeiski veturin kann finna uppá at spæla hund.

Er áhugi fyri venjingarlegum, ráðstevnum ella skeiðum uttan fyri kappingarárið hjá summarítróttini, ber til at vitja okkum á Gran Canaria í januar ella februar.

Her hava vit m.a. møguleikan fyri venjing í San Augustin við gisting á hotellinum Don Gregory ella í Puerto de Mogán við gisting á tí nýggja Radisson Blu.

Eisini her kunnu vit skipa fyri vøkrum útferðum – eitt nú til holubúgvarnar í Guayadeque ella kaffiplantasjurnar í bergtakandi Agaete-dalinum.



